# Landsstýrið leggur fótonglar fyri Skálafjarðartunnilin



ALFRED OLSEN
løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin

Svarið, sum Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna, hevði í løgtinginum týsdagin, til fyrispurningin hjá undirritaða viðvíkjandi Skálafjarðartunlinum, staðfestir, at sitandi landsstýri er við at beina fyri prosjektinum.

Einki uppskot verður lagt fyri tingið í hesi tingsetuni, sum loyvir P/F Skálafjarðartunlinum at fara undir tunnilsarbeiðið, so greið vóru boðini frá Bjørt Samuelsen, sum ístaðin fer at kanna aðrar møguleikar.

Besta samfelagsverkætlanin í Føroyum, er sprottin fram sum ein privat, lokal verkætlan, ið hevur til endamáls at binda báðar armarnar á Skálafjørðinum saman, og síðani at knýta Skálafjørðin við Suðurstreymoy.

Nú "rænir" landsstýrið verkætlanina frá tí privata, og gerð tað til eina almenna íløtu, sum landskassin veðheldur fyri, tí nú skal Skálafjarðartunnilin brúkast til at gjalda Sandoyartunnilin við, og harvið áleggur landsstýrið brúkarunum av Skálafjarðartunlinum ein serstakan eykaskatt.

Men í ringasta føri kunnu ætlanirnar hjá landsstýrinum viðføra, at hvørki Skálafjarðartunnulin ella Sandoyartunnilin blíva gjørdir.

Útrokningar vísa, at Skálafjarðartunnilin kann spara samfelagnum tvær mió. krónur um vikuna í minni orkunýtslu og tíðarsparing. Hesar tvær milliónirnar kostar tað samfelagnum fyri hvørja viku, sum prosjektið verður seinkað.

Undanfarna landsstýri legði stóran dent á at privatisera almenn partafeløg, meðan hetta landsstýrið ger beint tað øvugta. Nú verður so ein 100 % privat verkætlan "rænd" frá teimum, sum eiga hugskotið alt sum tað er, og flutt til tað almenna, og hetta kemur at hava ein stóran negativa ávirkan á tað privata initiativið í framtíðini.

Tað sær eisini út til, at nú tá tað almenna hevur gjørt av at "ræna" prosjektið frá initiativtakarunum, hendir ikki meira. Einki uppskot kemur í tingið, og eingin upphædd verður avsett á fíggjarlógini í 2008 til endamálið.

Og hvussu verður við Sandoyartunlinum, sum løgtingið hevur samtykt skal byrja í nov. 2009? Eru neyðugar milliónir avsettar á fíggjarlógini til henda tunnil, ella verður Skálafjarðartunnilin nú misbrúktur til at fora fyri, at Sandoyartunnilin verður gjørdur? Tí fíggjarliga er øllum greitt, at tað almenna kann ikki gera báðar tunlarnar í senn.

Loysnin er sera einkul, lat tað privata felagið gera og reka Skálafjarðartunnilin, inntil hann verður latin tí almenna fyri einki um eini 30 ár, og lat eitt alment partafelag gera Sandoyartunnilin, eftir sama leisti sum Vága- og Norðoyartunnilin.

Tá uppskotið til samtyktar um at fyrireika fast samband millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy (løgtingsmál nr. 79/2006) var til viðgerðar í tinginum, skrivaðu umboð Tjóðveldisfloksins, Tórbjørn Jacobsen og Heidi Petersen, í álitið, at "soleiðis, sum raðfestingarnar eftir øllum at døma verða frameftir í menning av føroyskum undirstøðukervi, er lítið væntandi, at hendan farleiðin verður veruleiki tey næstu tjúgu árini, um so er, at fasthildið verður, at hon er partur av almennari raðfesting, har ið alment fæ skal nýtast til at gjalda íløguna við. Út frá hesum mæltu tey frá at lata alment partafelag gera íløguna og tey mæltu somuleiðis frá at íløgan bleiv fíggjað við árligari játtan á fíggjarlógini".

Men nú sær út til at Tjóðveldi hevur broytt politikk á hesum øki, hóast samgonguskjalið sigur soleiðis um íverksetan: "Virkisfús fólk við góðum hugskotum og ætlanum verða stuðlað soleiðis, at leiðin frá hugskoti til veruleika verður léttari at ganga."

Hóast orð og gerðir ikki vísa seg at samsvara í løtuni, vóni eg at Løgtingið fastheldur, at tað privata felagið fær loyvi at gera Skálafjarðartunnilin, og at tíðarætlanin fyri gerð at Sandoyartunlinum kemur at halda.

# Ikki ber til at fjala seg fyri sínum egna skugga



ODDFRÍÐUR MARNI RASMUSSEN

Nú er aftur eitt fíggjarlógaruppskot farið av bakkastokki, og aftur hesaferð er uppskotið ein kámur skuggi av føroyskum politikki. Tað er ein háðan og ein skomm fyri okkum føroyingar, at dagsins politikarar eru so ólátaðir, at teir ikki kunnu standa við sínu føgru lovorð, sum vórðu floygd úr munni teirra fyri bara nøkrum fáum mánaðum síðani, og at teir ikki heldur megna at ganga inn fyri tí, sum teir sjálvir hava samráðst seg til og fest niður í samgonguskjalið. Ár um ár fær politiski veruleikin skyldina, men eg haldi, at talan er um politiskt dramblæti, har allir sum ein brúka heimsins elstu umbering: Tað var ikki eg, tað var hann. Hinir hava skyldina fyri, at eg taki ta avgerð, sum eg taki.

Í valstríðnum lovaðu í minsta lagi 17 av landsins kosnu, óansæð flokk, at Mentanargrunnur Landsins skuldi hækkast upp til 15 milliónir komandi fýra árini. Hetta er ein meiriluti av løgtinginum, so ongin forðing átti at verið fyri, at so varð gjørt. Men nú fíggjarlógaruppskotið er lagt fram, sær tað út til, at teir hava brotið bæði munnligar og skrivligar avtalur. Og tað so dyggiliga eisini.

Mentanin hevur altíð verið eitt skálkaskjól hjá politikarum. Teir hava í nógv ár, óansæð flokk, fjalt seg aftan fyri ein mentanarpolitikk. Teir hava brúkt hann í sínum egna hugtaki um eina serliga føroyska tjóð, hava brúkt mentanina (sum teir ikki vilja stuðla) sum skálkaskjól fyri eina tjóðarbygging, sum er láturlig, tí at við ongum stuðli til mentan og list, so kunnu teir eins væl geva tjóðini mønustingin – skera høvuðsæðrina av og melda seg inn í okkurt lokalt biddarafelag, ið ikki ætlar sær at gerast ein partur av altjóða pallinum. Kanska Norðurkorea hevði viljað havt okkum við.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 er enn ein láturlig roynd at fjala seg fyri síni egnu politisku hugmóð og egna dugnaloysi. Mentanin hevur í hesum fíggjarlógaruppskotinum fingið tað sama sum fyrr – nakrar silvurdálar, sum skulu brúkast til, at politikararnir kunnu siga við seg sjálvar, at vit hava hóast alt játtað til mentanina. Men hesar láturligu upphæddir gera ongan mun. Púrt ongan. Hundrað túsund her og hálvtrýss túsund har eru bara til at halda øll, sum eru við til at menna føroysku tjóðina, sum eru við til at skapa hesi ungu tjóðini ein tjóðarsamleika, fyri turra spott. Men, hugsar gløggi lesarin, hvat er so nóg mikið? Jú, upphæddirnar, sum talan er um, eru tær, sum landskassin fær inn í eykaavgjøldum fyri sigarettir í eitt ár (kanska fleiri høvdu lagt av at roykt eisini). Estland stuðlar listafólkum við teimum eykaavgjøldum, sum koma inn frá tubakki og rúsdrekka. Hví lata føroysku politikararnir ikki teir pengarnar til mentan og list? Nei, teir halda, at hasir býttlingarnir, sum sita og skriva, sum mála, gera tónleik, gera orðabøkur og annað, hatta eru bara sovorðnir letingar, sum ikki duga at fáast við okkurt annað.

At Mentanargrunnur Landsins er hækkaður við lúsa 200.000 krónum kennist á sama hátt, sum tá ið ein politikari hevur brúkt allar sínar pengar til valstríðið, og so verður hann ikki valdur á ting. Tær skapandi kreftirnar eru øðiligar í Føroyum, og teir, sum sita við róðrið vilja ikki vanda hendan fong – vilja ikki gera eina íløgu í tjóðina Føroyar. Teir hava ikki sæð, hvønn týdning skapandi og útinnandi listin hevur fyri Føroyar. Upphæddin, sum verður latin í stuðli til mentan og list kemur í minsta lagi fimm ferðirnar inn aftur. Ein annar vegur at gingið hevði verið, at teir pengar, sum listafólk hava goldið í skatti síðani 2000, t.e. pengar, sum listafólk hava fingið í starvsløn frá Mentanargrunni Landsins, kundu verið nóg mikið til at hækkað játtanina til grunnin munandi. Ja, tað er næstan bara hugflogið, sum setir markið fyri, hvat ið kann gerast. Men, tá ið politikarar skulu semjast um at stuðla list og mentan, so kemur altíð onkur tunnil í vegin, ella eitt ellisheim, ella ein skúli, ella ein skattalætti, ella ein tunnil, ella eitt vaktar- og/ella ferðafólkaskip, ella ein tunnil afturat, ella ein undirsjóvartunnil o.s.fr. o.s.fr. Umberingarnar fyri ikki at stuðla eru eins nógvar og lyftini, sum teir góvu øllum listafólkum fyri valið.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 er bara ein ógvuliga kámur skuggi av tí, sum varð lovað fyri valið. Hevði so talan verið um eina risastóra upphædd, so kundi eg skilt teir, men talan er um 10 milliónir í fýra ár til skapandi og útinnandi listafólk, til listafólk, hvørs verk finnast í øllum føroyskum húsarhaldum og í øllum almennum sum privatum bygningum, og sum er týdningarmesta amboð til at byggja tjóðina við.

Hetta er ikki ein meining frá einum kjarrgalnum, ráðaleysum manni – hetta er ein meining frá einum ógvuliga sviknum og skuffaðum manni. Og eg eri ikki einsamallur um hesa kensluna.

Eitt lovað orð eigur at hanga fast sum ein skuggi í einum menniskja, og sum tað ikki eigur at kunna renna ábyrgdarleyst frá. Nú skal so fíggjarlógaruppskotið leggjast fram fyri tær ymisku nevndirnar. Eg vóni, at tá ið uppskotið kemur fyri Mentanarnevndina, so fara teir at bera so í bandi, at Mentanargrunnur Landsins fær tað, sum honum varð lovað. Bill Justinussen og hini í Mentanarnevndini, nú kunnu tit vísa tykkum sum veruligar politakarar, ið standa við síni orð. Vit krevja bara, at tit halda tað, sum tit lovaðu at játta, tá ið tit vóru til setanarsamróðu við fólkið (t.e. valstríðið).

# Visiónin, ið hvarv



JÁKUP PERSSON

**Flogvøllurin verður 1600m**

Sambært viðmerkingum til fíggjarlógaruppskot 2008 verður flogvøllurin longdur 350m til 1600m.

Fyri nøkur av okkum, ið dagliga virka á flogvøllinum, tykist hetta ikki væl umhugsað. Atlantsflog hevur boðað frá, at tey eru farin at skifta flogfør teirra út við nýggjari, tøkniliga meiri framkomin flogfør. Hetta er ein visionér og neyðug hugsan. Núverandi flogfør teirra eru, umframt at nærkast 'eftirlønaraldrinum', í nógvar mátar ótíðarhóskandi og, fram um alt, sera dýr í brúki.

At longja flogvøllin úr 1250m til 1600m samstundis sum størri flogfør verða tikin í nýtslu á farleiðunum til/úr Føroyum, fer at seta somu avmarkingar fyri flogferðsluna, sum vit kenna í dag. Tað finst ongin dokumenterað kanning, ið rættvísger eina leinging til einans 1600m. Tað vil geva óneyðugar avmarkingar. Spyrji tykkum sjálvi, hví man ikki byggir 1600m flogvallir til miðberandi (mellemdistance) flogfør aðrastaðni!

Landstýriskvinnan í vinnumálum hevur í hesi vikuni sagt, at samferðsluútbyggingar eiga at verða gjørdar av tí almenna. Hetta er so satt sum tað er sagt! Tað almenna hevur jú staðið fyri bygging av ferjum, ferjulegum o.ø. uttan at útreiðslurnar tó eru álíknaðar teimum, ið gera brúk av hesum (Smyrlar, Ternan, Dúgvan, Sam v.m.).

Tað er tí ein sjálvfylgja, at hitt almenna beinanvegin fer at útbyggja flogvøllin, so hesin kemur uppá eitt støði, ið brúkarin (Atlantsflog og føroyska samfelagið) kann liva við. Tí eigur flogvøllurin at verða longdur til í minsta lagi 1800m og hjálpartólini (inn- og útflúgvingartólini) verða útbygd fullt út á konventionellan hátt. Um hetta ikki er fult nøktandi, so eigur ískoytisútgerð (supplerandi útgerð) eisini at verða sett upp. Hetta er ein samfelagsuppgáva og eigur ikki at verða álíknað brúkarunum meiri enn vit kenna tað frá ferjum, bergholum o.ø.